28. og 29. mai 2010

Vikuskiftis tilboð



› Øll vøra frá Grunt-Tiny Minymo og Minymo -20%

› AxumX jogging-buksir og blusu fyri setti bert kr. 250,- til gentur og dreingir 8-16 ár

0-16 ÁR

DADDAN AXUMX

Á hálsi · Smyrilsvegur 7 · tlf. 312138

Sosialurin 341800

Starvslýsing

Børn & Ung

## Endurlýsing eftir leiðara til nýggja bú- og viðgerðarstovnin

Nýggi bú- og viðgerðarstovnurin, fyri børn og ung við atferðar- og tillagingar trupulleikum, søkir eftir leiðara. Starvið verður at seta skjótast tilber.

Endamálið við stovninum er, at virka fyri menning og broyting hjá børnum og ungum við serligum tørvi, við aliti til, at tey fáa ta neyðugu hjálpina og umsorganina í mun til teirra trupulleikar. At tey fáa eitt trygt og stimbrandi umhvørvi at mennast í og gerast betri før fyri at klára seg í samfelagnum eftir uppihaldi á stovninum. Viðgerðin fer fram á stovninum, út frá eini viðgerðarætlan, ið stovnurin leggur í samráð við barnaverndartænastunar.

Bú- og viðgerðarstovnurin verður í tveimum deildum, onnur deildin er Rókin á Argjum og tann nýggja deildin, verður uttan fyri Havnina, har endaliga staðsetingin enn ikki er avgjørd. Børnini og tey ungu upp til 18 ár (21ár) verða innskrivað av høvuðsbarnaverndarnevnd ini eftir tilmæli frá baranverndarnevndunum.

Deildin, »Børn & ung«, er í støðugari menning og undir skipan, tí skal leiðarin tola broytingar og umskipanir innan økið. Somuleiðis er ein treyt, at leiðarin hevur eina ávísa fakliga breidd, tí tá ið talan er um børn og ung við serligum tørvi, er stundum neyðugt at seta serligar fyriskipanir í verk.

**Høvuðsuppgávur:**
- at leiða og fordeila arbeiði á stovninum við atliti til tørvin hjá brúkaranum
- at hava ábyrgdina fyri øllum tí fyrisitingarliga, umframt fíggjar- og stravsfólkaviðurskifti v. m
- at leggja til rættis og taka lut í starvsfólka- og fakligu menningini
- at samstarva við foreldramyndugleikan, barnaverndartænasturnar o. o.
- at menna samstarvið millum starvsbólkarnar og deildirnar

**Vit bjóða:**
- eitt sjálvstøðugt, avbjóðandi og spennandi starv
- góðar møguleikar fyri fakligari menning
- eitt fakligt umhvørvi, ið er undir støðugari menning

**Útbúgving:**
- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, sum t.d. kandidatur innan námsfrøði/sálarfrøði ella líknandi.
- Viðkomandi starvsroyndir
- Leiðsluútbúgving og/ella royndir innan leiðslu og fyriskipan
- Kunnleika til almenna fyrisiting og kt

**Persónligir eginleikar:**
- Hevur áhuga fyri avbjóðingum og er fús/ur at royna nýggjar leiðir
- Framsíggin og arbeiðir miðvíst fram ímóti settum málum
- Kunna ganga á odda, arbeiða sjálvstøðugt og duga væl at fyrisita/leiða
- Viðurkennandi leiðsluhátt
- Góð samstarvsevnir

**Lønar- og setanartreytir:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Nærverkið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Minnu Poulsen, leiðara, ella Mary í Garði, stjóra, tlf. 360000

**Umsókn:**
Umsóknir skulu sendast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Argjavegur 26, Argir
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
stílað: Minna Poulsen, leiðari fyri Børn & ung

ella til teldupostadressu:

naerverk@naerverk.fo

**Umsóknarfreist: 14. juni 2010.**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

NORÐOYASTEVNU FRAMSÝNINGIN

5. og 6. juni



Listaverk kunnu latast okkum í Skúlanum við Ósánna hósdagin
3. juni millum - kl. 16.00 og 17.00

Listaverkini skulu vera greið at heingja upp og yvitlit við heiti og kostnaði fylgja við.

Norðoya Listafelagið skilar sær rætt til avmarkingar í mongd av myndum at sýna fram.

DÁVUR WINTHER TLF. 222097
ARCHIBALD BLACK TLF. 264707

Norðoya Listafelag
Postsmoga 285 · 710 Klaksvík

Tekna teg sum lim í Norðoya listafelag á dw@klaksvik.fo
Flyt limagjald á kr 110,- í Norðoya Sparikassa 9865 4954429

i
Sosialurin

**SPECIAL (20 kg)**
Turrfóður til vaksnar hundar. Er eisini sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum og til eldri hundar.
Fyri posan...... kr. 450,-

**SØCLA (20 kg)**
Turrfóður til hvølpar, unghundar og tíkir, ið geva mjólk. Er eisini gott til aktivar hundar. SØCLA inniheldur C-vitamin.
Fyri posan...... kr. 540,-

**SKYTTENs KAT (15 kg)**
Turrfóður til kettur við nógvum proteinum frá fiski, flogfenaði og eggum. Inniheldur úrdráttir úr høsnarungalivur.
Fyri posan...... kr. 390,-

Kvalitetsfóður til kettur og hundar



Bilegg beinleiðis á netinum

www.fodursolan.com · info@fodursolan.com · Telefon 21 19 96 ÓKEYPIS ÚTKOYRING Í TÓRSHAVN OG NÆRINDIS